UTTAN ÚR HEIMI

## Ikki misbrúkt neyðhjálp

Myndugleikarnir í Sri Lanka avsanna, at teir hava brúkt neyðhjálparpengar til at keypa vápn fyri.

Uppreistrarmenninir har norðuri í landinum, Tamilsku Tikararnir, vildu fyri nøkrum døgum síðani vera við, at stjórnin hevði brúkt næstan 900 milliónir krónur at keypa vápn fyri, og at hetta vóru pengar, sum Sri Lanka fekk frá altjóða samfelagnum aftan á flóðalduna annan jóladag.

Men tað avsannar stjórnin í Colombo. Á einum fundi við norska uttanríkisráðharran, Jan Petersen, um vikuskiftið, segði srilankiski forsætisráðharrin, Mahinda Rajapakse, at als einki hald er í tíðindunum um vápnakeypið.

## Vilja troyna semju

Fyrrverandi finski forsetin Martti Ahtisaari fer nú at vita, um hann kann fáa semju ímillum indonesisku stjórnina og uppreistrarrørsluna GAM í landspartinum Aceh har norðuri á oynni Sumatra.

Báðir partar hava játtað at koma til samráðingarborðið, og teir fyrstu fundirnir verða í Helsingfors í næstu viku. Tað er tann serligi ráðgevingarstovnurin Crisis Management Initiative, sum Ahtisaari hevur stovnað, ið stendur fyri samráðingunum. Sjálvur sigur fyrrverandi forsetin við svensku tíðindastovuna TT, at enn er alt ov tíðliga at siga, hvat fer at koma burtur úr samráðingunum.

Ache-lansparturin varð sera meint raktur av jarðskjálvtanum og flóðalduni anan jóladag, men sambært TT hava friðarsamráðingarnar einki við vanlukkuna at gera, tí avtalan um samráðingarnar varð gjørd fyri jól.

## Kongur væl umtóktur

Flóðaldan í Suðurasia hevur havt við sær, at svenska kongshúsið er vorðið so væl umtókt sum sjáldan fyrr.

Ein kanning í blaðnum Dagens Nyheter vísir, at 80 prosent av svenska fólkinum taka undir við at varðveita kongsvaldið, og sambært blaðnum eru tað mong ár, síðani kongsvaldið var so væl umtókt ímillum fólk. Bara 16 prosent siga, at kongsvaldið eigutr at verða avtikið, og tey seinastu fýra prosentini vita ikki.

Eygleiðarar í Svøríki eru á einum máli um, at tann góða undirtøkan hjá kongshúsinum kemst av flóðalduni í Suðurasia. Tá møttu kongshjúnini og børn teirra á Arlanda-flogvøllinum mitt á nátt at taka ímóti líkunum av svium, sum vóru deyðir í flóðalduni, og undir einum minningarhaldi í Stockholm helt Carl Gustaf kongur eina hugvekjandi røðu. Yvirhøvur eru sviar samdir um, at kongur dugdi munandi betur at savna svenska fólkið enn forsætisráðharrin, Gøran Persson.

## Keyptu nógvar teldur í fjør

Teldusølan vaks 12 prosent í fjør samanborið við árið fyri, og kemst vøksturin serliga av, at farteldurnar eru vorðnar bíligari, enn tær hava verið, skrivar Politiken.

Eitt søluyvirlit hjá kanningarstovninum Gartner vísir, at Dell er tað best umtókta teldumerkið. Í fjør seldi fyritøkan næstan 31 milliónir teldur, og tað var heili 23 prosent fleiri enn í 2003. Næst var Hewlwtt-Paskard ella HP, sum tað vanliga verður nevnt, við 27,5 milliónum nýggjum teldum, og á triðja plássi var IBM, sum seldi 10,4 milliónir teldur í fjør. Eitt annað væl umtokt merki er Fujitsu-Siemens, sum seldi góðar sjey milliónir nýggjar teldur í fjør.

Verður hugt at allari søluni í heiminum, var parturin hjá Dell 16,4 prosent, hjá HP var hann 14,6, hjá IBM 5,5 og hjá Fujitsu Siemsns 3,8 prosent. Tilsamans vórðu 188,9 milliónir nýggjar teldur seldar í fjør.

Gartner sigur, at tað var serliga prísfallið á farteldunum, sum var orsøkin til, at teldusølan vaks so nógv í fjør. Eitt annað er, at farteldurnar eru eisini vorðnar betri, enn tær vóru fyrr.




*Í sambandi við 60 ára dagin er skipað fyri framsýning á ST-høvuðsborgini í New York*

*Reuters*

# Minnast Auschwitz

**Í vikuni eru 60 ár liðin, síðani sovjetskir hermenn komu til týsku týningarleguna Auschwitz. Fyri fyrstu ferð skipar ST fyri minningarhaldi til minnis um tey, sum doyðu í leguni**

MINNINGARHALD

*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Tað var tann 27. januar í 1945, at sovjetskir hermenn komu til nazistisku týningarleguna Auschwitz nærhendis polska býnum Krakow og fríaðu teir fangarnar, sum enn vóru á lívi í leguni.

Í hesum sambandi verður skipað fyri minningarhaldi í Auschwitz, har fleiri av teimum, sum sluppu úr leguni á lívi, verða hjástødd. Har verða eisini ríkis- og stjórnarleiðarar úr fleiri londum, teirra millum týski forsetin.

Hesaferð verður eisini skipað fyri minningarhaldi í ST, og tað er fyrstu ferð, at tað verður gjørt. Uppskotið um minningarhaldið kom frá USA, Russlandi og ES. Í tí sambandi var ein serligur minningarfundur á ST-høvuðsborgini í gjár, og har luttóku umboð fyri umleið 140 lond. Ísrael hevur fleiri ferðir fýlst á, at ST hevur víst jødatýningini undir seinna heimsbardaga ov lítlan áhuga, men ein trupulleiki hjá ST hevur verið, at fleiri arabisk lond hava verið ímóti tiltøkum, ið skuldi minnast jødatýningina. Men nú er øðrvísi, tí í gjár vóru fleiri arabisk lond umboðað á minningarfundinum. Teirra millum vóru eitt nú Marokko, Bangladesj, Oman og Pakistan.

Umleið ein millión fólk, tey flestu jødar, vórðu týnd í Auschwitz í árunum frá 1940 til 1945. Tað svarar til umleið 9.000 um samdøgrið. Teira millum vóru eisini nógvir sigoynarar og nógv samkynd.

# Stórkavi í USA

**Kavarok og nógvur kuldi í landnyrðingspartinum av USA hevur kravt fleiri mannalív**

ILLVEÐUR

*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Sambært amerikanska veðurstovninum hevur landnyrðingsparturin av landinum ikki havt so ringt kavaveður seinastu hundrað árini, og løgreglan upplýsti sunnukvøldið, at illveðrið hevði kravt 14 mannalív.

Tað hevur eisini verið sera kalt, og sunnudagin frysti 33 stig í Boston. Har mistu 33.000 húsarhald streymin.

Í New York er eisini nógvur kavi komin niður, og á tí stóra John F. Kennedy-flogvøllinum noyddust tey at avlýsa 60 fráferðir, tí so nógvur kavi var lægstur á lendingarbreytirnar.

Amerikonsku veðurmenninir søgdu í gjár, at veðrið fer at batna teir næstu dagarnar, men samstundis ávaraðu teir um, at seinni í vikuni verður aftur kavarok.

# Indonesia skelvir aftur

Ein jarðskjálvti, sum máldi 6,2 á Richter-stiganum, var á indonesisku oynni Sulawesi sunnudagin. Sambært myndugleikunum kravdi skjálvtin eitt mannalív, fleiri hús rapaðu, og nógvastaðni fóru vegirnir illa.

Fólk gjørdust ræðsluslign av skjálvtanum, tí tey stúrdu fyri, at hann fór at elva til eina flóðaldu eins og tann harði skjálvtin annan jóladag. Tí sendu myndugleikarnir løgreglubilar til býirnar og bygdirnar at boða frá, at eingin vandi var fyri flóðaldu hesaferð.

Indonesiski jarðfrøðistovnurin sigur, at miðdepilin í skjálvtanum sunnudagin var einar 30 kilometrar niðri í jørðini.